# Føroyski granskingargreðingurin gneggjar gorhungraður eftir gjaldføri

HÓRALDUR JOENSEN

Sambært visión 2015, so skulu vit føroyingar um fá ár vera í fremstu røð, eisini tá talan er um gransking á ávísum útvaldum økjum. Granskingarliguavreksverkini skulu gerast fyri munandi minni fæ, enn gjørt verður í grannalondum okkara. Í Føroyum verður 0,9 % av bruttotjóðarúrtøkuni nýtt til gransking, og í grannalondum er tilsvarandi partur 3-4 %. Sambært figgjarlógaruppskotinum fyri komandi ár, 2007, so er almenna játtanin til gransking økt við munaleysari upphædd, 0,5 milliónum Dkr. Hesi tøl vísa, at teir ráðandi í Havn ikki hava gjørt sær greitt, hvat ið krevst, fyri at vera í fremstu granskingarrøð. Fylgir figging ikki við visiónini, verður hon virðisleys.

Tegnar landsins, ið hava roynt at saðla almenna føroyska granskingargreðingin kunnu vátta, at hann svøltar. Ólukkudýrið er valla gonguført av figgjarmáttloysi. Teinur hansara fram eftir kunnleikans vegi her á landi er skammur sammett við drúgva reiðrarfjarleikan hjá útlendskukappingarneytunum. Tað er tó lítið at ivast í, at fær føroyski granskingargampurin tað, sum krevst fyri at fremja gransking í verki – gumpahús, gøgn og gjaldføri (høli, tól, fæ) – so verður hann aftur í oddinum millum hinar fljótu folarnar, sum testosteron-fullir, froysandi og við faxinum flákrandi í fríska ferðarlotinum fara tvísporandi fram eftir fróðarfarleiðini.

Í landbúnaðarbygdunum her á landi var vanliga hildið hánt um ánara, ið fóðraði gangara sín so vánaliga, at arbeiðsorka, treysti og snarleiki vórðu skerd. Men kallarnir á ovastu valdsrók í Føroyum tykjast leggja sektin í, um granskingarrossið lýðir hungur og hall, tí gneggjar granskingargreðingur Føroya framvegis gorhungraður eftir gjaldføri. Paradísið, Føroyar, eigur einki munagott at geva honum. Harmiligt fyri hestin, tí betur hóvar honum at sveitta enn at svølta. Fær føroyski granskingargreðingurin ikki gumpahús, gøgn og gjaldføri eins og hinir útlendsku, so verður hann ikki kappingarneyti, men drumbur og tjórneyt.

Einasta vón er, at fróðu fljóðini í Føroyum fylkjast í flokk og fjølment taka sæti á løgtingi og í landsstýri. Við teirra innliti og hugskygni vita tey ivaleyst betur enn núverandi fólkavaldu kallmenn, hvat krevst til at nøkta tørvin hjá almenna føroyska granskingargreðinginum, dráttardjórinum, sum skal draga Føroyar inn í dýrdina og dreymasæluna, visión 2015.

# Okkurt hava tit tó fingið av skafti – Edmund tingformaður!

EGIN HENRIKSEN



Hóast meiningarnar eru ymiskar um virðini av politiska arbeiðinum.

Við endan av 2006 megnaðu tit t. d. at skriva søgu, tá Sambandsflokkurin fór í parlag við Tjóðveldisflokkin, og tað við danskari kongligari fyriskipan (266 b).

Skil tað hvør, ið skilja vil.

Í øldir hava Føroyar verið kloyvdar av lemjandi ósemju um samband ella loysing, og sum um tað ikki var nógmikið, megnaðu tit at skapa eina nýggja gjógv í føroyska fólkinum, hesuferð um virðir – føroyska mentan. Um hetta er liður í visiónsætlanini ella ikki, kann lesarin sjálvur døma um.

Tað stóra takið hjá einum nýggjum løgtingi verður: at fáa Føroyar aftur á slóðina, at skapa álit í føroyska fólkinum, at fáa fólkið at draga somu línu tjóðini at gagni, seta føroyska mentan og føroysk virðir í hásæti, forða tjóðveldinum at dragsa danskan ómoral inn í landið við kongligum fyriskipanum, og so sjálvandi at seta roykibann í løgtingshúsunum.

# Fyrispurningur um radara í føroyskum loftrúmi

HEIDI PETERSEN
løgtingskvinna



**Munnligur fyrispurningur til Jóannes Eidesgaard, løgmann. Viðvíkjandi støðuni við ongum radara til eftirlitið við føroyska loftrúminum.**

Hvørja ætlan hevur løgmaður at tryggja eftirlitið við føroyska loftrúminum?

Hevur løgmaður verið til samráðingar við aðrar myndugleikar um eftirlitsuppgávuna, og hvørjar avtalur eru gjørdar hesum viðvíkjandi?

Nær verður radareftirlit við føroyskum loftrúmi uppafturtikið, av hvørjum og við hvørjum treytum verður hetta eftirlit framt á føroyskum øki?

Heldur løgmaður tað vera skilagott, at føroyingar sjálvir stóðu fyri støðini og róku hana við tí fyri eyga at hava eftirlit við Føroyska loftrúminum og harvið tikið hesa ábyrgdina á føroyskar hendur og framt okkara skyldur í altjóða samfelagnum?

**Viðmerkingar:**

Setti spurning til løgmann í november í fjør um, hvørja ætlan Føroya Landsstýri hevði við radarstøðini á Sornfelli, tá hon varð afturlatin á nýggjárinum. Um tað ikki var hóskandi at vit í Føroyum sjálvi kundu reka radarstøð og hava okkara egna eftirlit við føroyska loftrúminum, og lovaði løgmaður at loysn var funnin á málinum, tá radarin var sløktur á nýggjárinum.

Sjálvt um løgmaður váttaði, at loysn skuldi finnast á málinum, frættist í Útvarpi Føroya at onki radareftirlit er við føroyska loftrúminum, og at tað er til bága fyri ferðsluna loftvegis til og úr Føroyum.

Sum eg vísti á í fyrra fyrispurninginum hevði høvi verið at fingið hetta eftirlit á føroyskar hendur nú, og vit kundu lagt okkara egnu ætlanir fyri, hvat okkara loftrúm kann nýtast til, og hvussu eftirlitsuppgávan skuldi røkjast í framtíðini.

Ein sera aktuellur spurningur í sambandi við ábyrgdina av eftirlitinum við loftrúminum er eisini støðan til ólógligan fangaflutning ígjøgnum føroyskt loftrúm, har eg haldi tað hava sera stóran týdning at kunna seta mark fyri, hvat ber til hjá okkum og hvat ikki ber til, einans við ábyrgd av og eftirliti við egnum øki kunnu vit vera vís í, at tað eru føroysk áhugamál sum vera røkt og ikki hernaðaráhugamál hjá fremmandum tjóðum.

Við vón um at Føroya løgmaður sær álvaran í hesum máli og vil taka ítøkilig stig at loysa tey, seti eg fram fyrispurningin.


## Vága Dansifelag

Eykaaðalfundur verður í Beitinum mikukvøldið 31. januar kl. 20.00.

**Skrá:**
Húsið
Ymiskt

***Nevndin***

**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**

## Fyribilsskráseting 2007

Skal fyribilsskatturin verða rættur, mugu vit hava rættar upplýsingar um B-inntøku og frádráttir.

**B-inntøka**
B-skatturin í 2007 verður roknaður út frá teimum upplýsingum, tú hevur givið á sjálvuppgávuni 2005.

Er B-inntøkan broytt í 2006, verða broytingarnar tiknar við í fyribilsskattaskránna 2007.

**Frádráttir**
Hevur tú frádráttir, er neyðugt at upplýsa okkum um teir.

**Rættingar/fráboðanir**
Oyðublað til at rætta ella skráseta fæst á Toll- og Skattstovuni, í peningastovnum, á posthúsum, og kann verða heintað á heimasíðuni: www.tollskatt.fo

Tú ert vælkomin at fáa upplýsingar um, hvørjar skrásetingar vit hava um tíni skattaviðurskifti.

*á Argjum, 19. januar 2007*

**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**

## Írestandi skattur og AM-gjald 2006

Freistin at gjalda írestandi skatt og írestandi AM-gjald fyri skattaárið 2006 er 31. januar 2007. Verður goldið innan henda dag, slepst undan eykagjaldinum á 4%.

Útrokningarforrit er at finna á heimasíðuni **www.tollskatt.fo**

Eisini ber til at rokna írestandi skattin út í bóklinginum »Skattinum 2006«, ið øll húski fáa í januar 2007.

Tá skatturin verður goldin, skal viðmerkjast: p-tal og »Skattur 2006«. Gjaldið skal setast inn á eina av hesum kontum hjá Føroya Gjaldstovu:

| | | |
|---|---|---|
| Føroya Banki | 6460 | 260.005.8 |
| EIK | 9181 | 185.012.3 |
| Norðoya Sparikassi | 9865 | 185.016.9 |
| Suðuroyar Sparikassi | 9870 | 100.090.0 |
| GIRO | 9909 | 50.040 |

*á Argjum, 19. januar 2007*